# ár í



*– Útgangsstøðið hjá okkum er ikki tað besta. Men vit geva ikki skarvin yvir og tí gera vit nú, alt, vit kunnu, fyri at bjarga stumpunum, so at vit kunnu fara undir tann næsta festivalin. – Vit hava avgjørt møguleikan at skapa nakað í Suðuroynni. Men tað krevur, at vit taka lógvatak saman um at fáa nakað gott burturúr. Og tað krevur, at vit taka okkum saman, sum ein oyggj og ikki hugsa um, um tiltakið er í Vági ella á Tvøroyri, sigur Kristian Holbæk Kristensen.*

tað vanliga eini 1.000-1.500 hjálparfólk

Og tað skerst heldur ikki burtur, at tað var ómøguligt at fáa ein føroyskan høvuðsstuðul av týdningi. Tí varð tað íslendska bryggjaríið, Vífillfell, sum var høvuðsstuðul, og tað játtaði fyritøkan at kalla beinanvegin.

### Festivalur í nýggjum hami

Men Kristian Holbæk heldur, at hinvegin mugu vit eisini ásannað, at tað er við at koma inflatión í festival-hugtakið. Í einum landi við sløkum 50.000 fólkum er neyvan pláss fyri meiri enn tveimum, stórum festivalum og tað gekk so útyvir jóansøkufestivalin.

Men hann heldur, at tað er harðliga brúk fyri tilboðum til børn, ung og tilkomin afturat ítróttinum.

– Børnini og tey ungu verða stimbrað ov lítið, tí tað eru so fá tilboð til tey.

– Og jóansøkufestivalurin verður aftur næsta ár, ongin ivi um tað, leggur hann afturat

Fyrireikararnir arbeiða nú av kraft fyri at fáa tað fíggjarliga í rættlag, so at farast kann undir at leggja næsta festival til rættis, við tí lærupeningi í viðførinum, sum tey fingu av hesum festivalinum.

– Men eg haldi, at tað er neyðugt, at festivalurin er ein integreraður partur í sjálvari jóansøkuni og eg haldi, at tað er neyðugt at broyta innihaldið – og kanska eisini navnið, tí eg haldi, at tað er komið inflatión í festivalhugtakið í Føroyum.

Sostatt haldi eg eisini, at festivalurin eigur at liggja undir sjálvari jóansøkunevndina, men so krevur hon, at nevndin eisini verður víðkað til at umfata aðrar áhugabólkar enn akkurát ítróttarfeløgini.

– Eg haldi eisini, at festivalurin skal ikki vara í fleiri dagar. Hann skal bara vera ein dag við lutfalsliga fáum, men góðum nøvnum og einum ella tveimum stórum høvuðsnøvnum.

– Samstundis haldi eg, at jóansøkufestivalurin skal vera annað enn bara tónleikur. Barnasjónleikur, dansur og annað úr Føroyum og útlondum, kundi verið eitt frískt íkast til festivalin.

Hann heldur eisini, at festivalurin skal vera á fleiri smærri pallum ymsastaðni í býnum, so at vit fáa fleiri, smáar, intimar framførslur, við onkrum størri palli til høvuðsnøvnini.

### Heita á suðuroyingar um stuðul

Fyrsta stigið at endurreisa jóansøkufestivalin varð tikið herfyri, tá ið hvørt húski í Suðuroy fekk skriv við áheitan um fíggjarligan stuðul og við áheitan um at melda seg inn í festival-felagið og sostatt fáa avsláttur av atgongumerkjunum.

Næsta stigið at endurreisa jóansøkufestivalin verður tikið síðst í oktober, tá ið ið stórt tiltak verður í Suðuroy í samstarvið við Norðurlandahúsið.

Tá fara Peter Abrahamsen og Bell Pepper Boys á pallin, saman við frálíka vísusangaranum, Stanley Samuelsen og kórinum Glymur.

Ætlanin hevur verið at hetta tiltakið skuldi vera í Ítróttarhøllini í Trongisvági, men enn hava tey ikki fingið at vita, um tað ber til at fáa høllina til tiltakið.

– Og so verður arbeitt haðani frá, til vit aftur kunnu bjóða fólki vælkomin á jóansøku á Tvøroyri næsta ár, sigur Kristian Holbæk



*Nógv ilskast inn á seyð, sum gongur á vegum og gøtum ímillum húsini og er til fortreð fyri ferðsluna. Men gongst sum ætlað, verður hetta seinasti veturin, at tvørafólk hava hendan ampan at dragast við*

# Tvøroyafólk sluppu væl

**Tvøroyri verður nú vetrarfriðað fyri seyð, men tað letur seg bara gera tí at teir, sum eiga hagarnar, hava verið ómetaliga lagaligir, sigur borgarstjórin**

VETRARFRIÐING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Gongst sum ætlað, verður hetta síðsti veturin, at seyður gongur leysur ímillum húsini á Tvøroyri.

Tvøroyrar býráð hevur í fleiri ár arbeitt við eini ætlan um at friða býin fyri seyð um veturin, men tað er hetta seinasta árið, at verulig gongd hevur verið í arbeiðnum.

Og nú er tað komið hartil, at fríggjakvøldið skuldi Tvøroyrar Býráð taka støðu til eina avtalu við hagarnar um at vetrarfriða tað mesta av býnum innanfyri bøgarðarnar.

Verður hendan avtalan endaliga undirskrivað, fer tað, sum nú verður vetrarfriða, at røkka eystast úr Froðba, heilt inn til elverkið í Trongisvági.

Tað er Kristin Michelsen, borgarstjóri, hevur staðið fyri samráðingunum býráðslimir hildu, at tað hevði eydnast honum at fáa eina avbera góða avtalu fyri kommununa.

Skuldi kommunan betalt fullan prís fyri tað, sum nú verður vetrarfriðað, hevði tað kostað kommununi 11,5 milliónir.

– Men eigararnir hava verið so avbera lagaligir, at hetta fer ikki at kosta kommununi meiri enn 1,5 og 2 milliónir – og tá er stikið enntá sett upp, sum forðar seyðinum at koma oman í býin, sigur borgarstjórin.

Somuleiðis er ein avtalað eftir sama leisti næstan komin undir land um at vetrarfriða alt lendið innangarðs úr Hellá, sum er mark ímillum Trongisvág og Øravík, heilt inn í Rangá.

Á býráðsfundinum í kvøld varð full semja um, at hagarnir eiga stóra tøkk uppibornað fyri, at teir hava verið so lagaligir, tí annars hevði tað aldrin latið seg gjørt.

Býráðslimir tóku eisini undir við, at Tvøroyri verður vetrarfriðað, tí hildið varð ikki, at tað hóskar seg nú á døgum at hava seyð gangandi ímillum húsini.

Tað, sum verður friðað, er allur býurin innanfyri bøgarðarnar, og borgarstjórin sigur, at hetta er ein avtala um vetrarfriðing, sum er eindømi í øllum landinum og hann fegnast um, at tað hevur borið til at koma so langt.

Tá ið alt hetta er friðað, sum nú liggur í kortunum, er bara økið frá elverkinum, inn til Sterling eftir, umframt Øravík.

Men ørvingar hava kravt fullan prís fyri mist vetrarbit og býráðslimir á Tvøroyri eru ikki sinnaðir at geva ørvingum betri sømdir enn restin av sóknini hevur.

Tí verður fyribils ikki gjørt meiri fyri at vetrarfriða Øravík og inn til Hellá, sum er áraka havnina á Drelnesi.

Og borgarstjórin heldur, at tað er undarligt, at ørvingar, har tað mesta er landsjørð, skulu krevja fult endurgjald, tá ið ognarmenninir á Tvøroyri hava verið so lagaligir, sum teir hava verið.

Skuldi kommunan goldið fullan prís fyri alt vetrarbitið, hevði tað kostað kommununi einar 20 milliónir og tað kommunan aldrin klárað, sigur borgarstjórin.